HEILSUMÁLARÁÐIÐ

# Vegleiðing um møguleikar fyri endurgjaldi til sjúklingar og eftirsitandi hjá sjúklingum í føroyska heilsuverkinum

Føroyska heilsuverkið hevur síðani 1. januar 2012 verið partur av almennu donsku sjúklingatryggingini, Patienterstatningen. Við hesum eru sjúklingar tryggjaðir lættari og skjótari atgongd til møguligt endurgjald fyri skaðar elvdir av kanning ella viðgerð í føroyska heilsuverkinum enn eftir vanligu endurgjaldsreglunum.

Hetta er eisini galdandi fyri skaðar, sum eru hendir í sambandi við kanning/viðgerð uttanlands eftir ávísing frá føroyska sjúkrahúsverkinum.
Í vegleiðingini fært tú at vita, hvussu tú fráboðar ein skaða, hvørjar freistir eru galdandi o.s.fr.

***Gev gætur, at sjúklingatrygging einki hevur við kærur at gera.***

Um tú vilt kæra um eina viðgerð, tú hevur fingið í heilsuverkinum, skalt tú venda tær til Styrelsen for Patientklager.

Tú kanst lesa meira um tínar møguleikar at kæra á heimasíðuni hjá Heilsumálaráðnum ella á heimasíðuni hjá Styrelsen for Patientklager.

## Rætturin til endurgjald fyri skaða av kanning og viðgerð

Sjúklingatryggingin fevnir um skaðar, sum eru hendir í 2012 ella seinni. Henda avmarking er galdandi, tá skaðin er hendur í føroyska heilsuverkinum, ella á útlendskum viðgerðarstað, eftir ávísing frá føroyska sjúkrahúsverkinum. Avmarkingin er tó ikki galdandi fyri skaðar hendir í danska heilsuverkinum.
Allar viðgerðir, sum eru framdar av ella eftir ávísing frá løggildum heilsustarvsfólkum og øll viðgerðarstøð, har løggildað heilsustarvsfólk starvast, eru umfatað av sjúklingatryggingini.
Verður fráboðaður skaði viðurkendur, verður endurgjald roknað sambært galdandi lóg um endurgjaldsábyrgd.

## Hvat er umfatað av endurgjaldsrættinum?

Endurgjald kann verða veitt, tá ein av niðanfyri nevndu treytum er lokin:

- Skaðin hevði mest sannlíkt ikki verið hendur, um sama kanning/viðgerð undir somu umstøðum hevði verið framd av einum royndum serlækna.
- Skaðin er mest sannlíkt elvdur av breki ella óvirkni í tólbúnað, sum er nýttur til kanningina/viðgerðina.
- Skaðin hevði mest sannlíkt ikki verið hendur, um onnur eins munadygg viðgerðartøkni ella – háttalag hevði verið nýtt.
- Skaðin er sera óvanligur og álvarsamur í mun til sjúkuna, sum viðgerðin verður givin fyri, og skaðin er størri enn tað, sum sjúklingurin eigur at kunna tola.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • www.hmr.fo • hmr@hmr.fo

## Hvat er ikki umfatað av endurgjaldsrættinum?

Sjúklingatryggingin fevnir bert um skaðar, sum standast av sjálvari kanningini og/ella viðgerðini. Dømi um støður, har endurgjald ikki verður veitt eru:

- Tá skaðin er ein avleiðing av sjúkuni, sum viðgerðin er sett í verk fyri at basa ella linna.
- Tá viðgerðin ikki hevur væntað árin á sjúkuna.
- Tá fíggjarligi missurin hjá sjúklinginum ikki er størri enn 10.000 kr.

## Endurgjald fyri skaðar av heilivági

Sjúklingatryggingin fevnir um kropsligar skaðar, sum eru elvdir av læknafyriskrivaðum heilivági.  Endurgjald verður ikki veitt fyri sálarligt mein.
Verður fráboðaður skaði viðurkendur, verður endurgjald roknað sambært galdandi lóg um endurgjaldsábyrgd.

## Treytir fyri at fáa endurgjald

- Skaðin er mest sannlíkt elvdur av heilivágnum
- Talan skal vera um mein (hjáárin), sum fara útum tað, ið sjúklingurin eigur at tola. Hetta merkir, at sjúklingar við álvarsomum sjúkum mugu tola størri og álvarsamari hjáárin enn sjúklingar við minni álvarsomum sjúkum.
- Sjúklingurin skal hava havt ein fíggjarligan miss, sum er størri enn 3.000 kr.
- Sjúklingurin skal hava fingið heilivágin frá apoteki, sjúkrahúsi, lækna ella tannlækna.

## Fyrning

Viðgerðar- og heilivágsskaðar skulu fráboðast til Patienterstatningen í seinasta lagi 3 ár eftir, at sjúklingurin varnaðist, ella átti at havt varnast skaðan. Viðgerðarskaðar, sum ikki eru fráboðaðir í seinasta lagi 10 ár eftir, at skaðin er hendir, eru tó endaliga fyrnaðir, og tá kann Patienterstatningen ikki veita endurgjald. Sama er galdandi fyri heilivágsskaðar, um teir ikki eru fráboðaðir í seinasta lagi 10 ár eftir, at heilivágurin varð útflýggjaður.

Endurgjald verður ikki latið fyri skaðar, sum eru hendir í føroyska heilsuverkinum fyri 1. januar 2012. Sama er galdandi fyri skaðar, hendir í sambandi við kanning/viðgerð uttanlands eftir ávísing frá føroyska sjúkrahúsverkinum. Avmarkingin er tó ikki galdandi fyri skaðar hendir í danska heilsuverkinum.

## Serligt fyri gagn- og blóðgevar v.m.

Fyri gagn- og blóðgevar umframt frískar persónar, sum luttaka í læknavísundaligum royndum, verður sum meginregla veitt endurgjald fyri allar skaðar, sum gagn-/blóðgávan ella royndin mest sannlíkt hevur verið orsøk til. Hetta er galdandi uttan so, at onnur orsøk til skaðan er eyðsæð.

Blóðgevarar kunnu eisini fáa endurgjald fyri skaðar, sum íkoma undir flutningi til avtalaða blóðgávu, umframt fyri materiellar skaðar, sum henda í sambandi við blóðgávu, so sum blóðdálkan av klæðum o.tl. Einki minstamark er fyri endurgjaldi til gagn- og blóðgevar og frískar persónar, sum luttaka í læknavísundaligum royndum, tá skaðin er elvdur av gagn-/blóðgávuni ella av læknavísundaligu royndini.

## Vegleiðing og mannagongd

Øll løggilda heilsustarvsfólk hava skyldu til at vegleiða sjúklingum, sum ynskja at søkja endurgjald frá Patienterstatningen.

Skaði verður fráboðaður við at útfylla serlig oyðubløð, sum tú finnur á heimasíðuni hjá Patienterstatningen undir ‘Søg erstatning’ ella við at trýsta her. Oyðubløð fáast eisini frá

kommunulækna, sjúkrahúsdeild ella frá løggildum privatstarvandi heilsustarvsfólkum so sum sálarfrøðingum, fysioterapeutum, kiropraktorum v.fl. Oyðubløð kunnu eisini fáast við at seta seg í samband við Heilsumálaráðið umvegis teldupost hmr@hmr.fo ella á tlf. 304050.

## Meiri kunning, ráð og vegleiðing

Tørvar tær meira vegleiðing um tínar kærumøguleikar ella hjálp til at skriva eina kæru, kanst tú venda tær til Heilsumálaráðið umvegis teldupost hmr@hmr.fo ella á tlf. 304050.